## Bendtner fær rós frá Wenger

Arsenal manglaði bæði Emmanuel Adebayor og Robin van Persie í álopinum, tá liðið leygardagin vann 2-1 á Manchester United. Danin Nicklas Bendtner spældi í álopinum, og venjarin Arsene Wenger var væl nøgdur við avrikið. - Bendtner spældi ein sera góðan dyst. Mikudagin spældi hann ikki so væl, men í dag kom hann aftur og gjørdi gott avrik. Hetta vísir bara, hvussu trupult starvið sum venjari er, sigur Arsene Wenger.



## Frankie skal venja B71

Frankie Jensen hevur fingið álagt uppgávuna at lyfta B71 upp aftur í bestu deildina. Tað skrivar heimasíðan hjá sandoyingum, nú avtala er fingin í lag við Frankie Jensen um at standa á odda fyri besta mansliði felagsins. Frankie Jensen er ættaður av Sandoynni, men hevur seinnu árini virkað sum ungdóms og 1. deildarvenjari hjá HB. Harafturat var hann í fyrru kappingarhálvu í ár høgra hondin hjá Rúna Nolsøe.



*Superliga um trý ár og vónandi medeigari av nýggjari multi-arenu. Tað er millum annað tað, sum sett út í kortið fyri komandi árini hjá FC Amager*

# Stadion hjá Toda vísast í Føroyum

**Umboð fyri fótbóltsfelagið FC Amager koma í vikuni til Føroya at kunna føroysku íleggjararnar um nýggju multiarenaina og gongdina hjá felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Partur av konseptinum hjá Fremad Amager eru føroysku íleggjararnir, har eitt árligt tiltak fyri hesum er fastur partur. Og nú hósdagin klokkan 18 verður fyrilestur á Hotel Føroyum, tá føroysku íleggjararnir í FC Amager eru bodnir til ein góðan bita saman við leiðsluni í felagnum.

Fyrst fer Brian Møllerup, ið er arbeiðsstýrisformaður í felagnum at hava framløgu um nýggju multiarenaina, ið ætlanin er at byggja á Amager. Síðani fer Todi Jónsson at kunna føroysku íleggjararnar um ítróttarligu gongdina í felagnum í seinastuni og um ætlanirnar framyvir, millum annað hvussu felagið skal koma upp í Superliguna í 2011.

Endamálið við ferðini er at skapa og viðlíkahalda eitt gott tilknýti millum íleggjararnar og felagið

## Góður útisetadagur

**Sunnudagurin royndist væl hjá hondbóltsútisetunum í Keypmannahavn. Bæði kvinnurnar og harrarnir vunnu sín dyst**

HONDBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Kvinnurnar vunnu sannførandi 24-15 á KFUM. Dysturin gjørdist ongantíð spennandi, tí beinanvegin í dystinum hevði ÍF Føroyar lagt seg á odda 6-1. Munurin helt sær til hálvleik.

Eftir stegðin kom KFUM betur við og miðskeiðis í øðrum hálvleiki var støðan 17-14 til ÍF Føroyar.

Men so setti ÍF Føroyar ferðina upp, og KFUM megnaði als ikki at fylgja við. Dysturin endaði 24-15 til ÍF Føroyar, og kvinnurnar liggja nú greitt á odda í deildini.

Harrarnir høvdu tað ikki eins lætt og kvinnurnar. Mótstøðuliðið Team Nørrebro hevði vunnið allar sínar dystir, men mættu at endalúta fyri sterku føroyingunum.

Dysturin varð ógvuliga spennandi og endaði við einum teprum 21-20 sigri til ÍF Føroyar, sum annars var aftanfyri 10-11 í steðginum.

Gjøgnum dystin skiftust liðini um at vera á odda, og munurin gjørdist ongantíð meiri enn tvey mál.

Sjálvur endin gjørdist serstakliga spennandi. Tá 40 sekund restaðu vóru fimm føroyingar á vøllinum, meðan Nørrebrodreingirnir vóru fýra. Føroysku leikararnir mistu tó bóltin av hondum, men ein frágera góð bjarging frá Ragnar Mouritsen tryggjaði, at støðan var verandi 20-20. So gekk tað skjótt hinvegin, og Leif Mikkelsen tryggjaðu ÍF Føroyum sigurin.

Menninir býta nú oddasessin við eitt lið, ið rópar seg FIF 5.

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 6 | 6 | - | 0 | 18 | 7 | 11 |
| 2 Mjølnir | 6 | 4 | - | 2 | 13 | 7 | 6 |
| 3 Dráttur | 6 | 4 | - | 2 | 14 | 10 | 4 |
| 4 Fleyr | 6 | 4 | - | 2 | 13 | 9 | 4 |
| 5 ÍF | 6 | 2 | - | 4 | 10 | 12 | -2 |
| 6 KÍF | 6 | 1 | - | 5 | 9 | 15 | -6 |
| 7 TB | 6 | 0 | - | 6 | 1 | 18 | -17 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 2 | 1 |
| 2 ÍF | 2 | 1 | - | 1 | 5 | 4 | 1 |
| 3 Fleyr | 2 | 1 | - | 1 | 4 | 4 | 0 |
| 4 Mjølnir | 1 | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 |

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 5 | 5 | - | 0 | - | 0 | 139 | 93 | 46 | 10 |
| 2 VB | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 136 | 114 | 22 | 8 |
| 3 Neistin | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 126 | 113 | 13 | 5 |
| 4 Tjaldur | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 113 | 109 | 4 | 5 |
| 5 StÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 107 | 142 | -35 | 2 |
| 6 Kyndil | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 87 | 137 | -50 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 129 | 119 | 10 | 8 |
| 2 StÍF | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 119 | 109 | 10 | 7 |
| 3 H71 | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 136 | 120 | 16 | 6 |
| 4 Neistin | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 153 | 145 | 8 | 6 |
| 5 KÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 116 | 135 | -19 | 2 |
| 6 Kyndil | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 113 | 138 | -25 | 1 |